# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Richard Schwartson 50 ár



Í dag, týsdagin 16. august, verður Richard Schwartson í Havnini 50 ár. Hann er farmaseutur, og hann hevur tey seinastu árini arbeitt hjá landsapotekaranum.

Richard er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Foreldrini eru Noomi og Schwartz Jacobsen. Hon er av Heygum í Klaksvík, og hann úr Norðragøtu. Noomi og Schwartz bygdu miðskeiðis í fimti árunum á Gerðareiði, har tey búðu, inntil tey mitt í sjeyti árunum fluttu til Norðragøtu at búgva. Tey eiga tríggjar synir - Richard, Amaliel, sum býr í Norðragøtu og Súni, sum býr á Argjum.

Richard tók studentsprógv í Hoydølum í 1975. Í 1984 leyk hann prógv frá Farmaseutháskúlanum í Keypmannahavn, og tá flutti familjan til Havnar, har tey bygdu húsini í Lambagerði, sum framvegis eru karmur um gott familjlív og hugnaligt heim við stórum gestablídni.

Richard starvaðist á Tjaldurs Apoteki fram til 1995. Tá fluttu tey til Onglands, og har vóru tey í knappliga tvey ár. Richard arbeiddi sum farmaseutur samstundis, sum hann tók master útbúgving í IT á lærdum háskúla í Milton Keynes, nevndur De Montfond Milton Keynes University.

Í 1998 og 1999 arbeiddi Richard á Heilsumálaráðnum, og síðani í 2000 hevur hann verið hjá Landsapotekaranum.

Richard var í mong ár limur í Vísinda siðsemisnevndini, hann hevur verið limur í KT foruminum, sum veitir vinnumálaráðnum ráð, og hann er limur í Granskingarráðnum.

Richard hevur umsett Fyrstu hjálpar handbókina og eina Smábarnabíbliu, og hann stuðlar konuni væl í bókahandlinum LOGOS í J. Nolsøesgøtu, sum hon eigur og rekur. Árini í Keypmannahavn var Richard nógv í Kristnastovu, og síðani tey fluttu til Havnar, hevur hann havt sína dagligu gongd í Ebenezer, har hann eitt nú hevur verið uppi í barna- og ungdómsarbeiði. Hann er væl belestur, og hann hevur serligan áhuga fyri teimum fundamentalu spurningunum, eitt nú um skapan og menningarlæru. Fleiri ferðir hevur hann luttikið í almenna orðaskiftinum um tílíkar spurningar.

Í barna- og ungdómsárunum hevði Richard góðan hug og gott hegni til ítrótt. Hann spældi við KÍ, og í 1975 var hann á landsliðnum, sum spældi í Íslandi.

Richard giftist í 1977 við Onnu, fødd Kjærbo og ættað úr Havnini. Tey eiga tríggjar døtrar - Noomi fødd 1982, Judith fødd 1984 og Maria fødd 1988. Í 1978 fingu Anna og Richard ein son, sum æt Osbjørn. Hann livdi í trettan mánaðir, áðrenn hann doyði av sjúku.

50 ára føðingardagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum, har tað í annað kvøld - mikukvøldið 17. august - verður opið hús frá klokkan 18.

## Jóhan Lervig sjeytifimm



Týsdagin verður ein lorvíksingur búsitandi á Skála sjeytifimm ár.

Jóhan traðkaði sínar barnaskógvar úti á Garði í Lorvik, hansara ættarbond í faðirætt er úr Símunshúsi og í móðurættina á Regni í Lorvík.

Jóhan var ikki fermdur, tá íð hann misti mammu sína, og sótu hann og yngra systurin Kristianna, sum býr í Leirvik, móðurleys á teirra bestu ungdómsárum.

Pápin, Tummas í Símunshúsi var sjómaður, og royndi hann á besta hátt at klára vegin og dagin.

Í 1954 giftist Jóhan vid Elinborg úr Norðragøtu, ættað úr Mortanstovu í móðurætt, og Jákupstovu í faðirætt.

Eins og Jóhan, var Elinborg móðurleys, og hevði hon næstyngsta beiggjan við sær til Lorvíkar. Tey búsettust úti á Garði í barnaheiminun hjá Jóhan.

Jóhan, ið er kendur sum fyrrverandi smiðjumeistari á Skála skipasmiðju, fór sjálvur í læru har í 1948, var burtur frá nakað í 1950, men helt so áfram til 1952, tá hann fór á maskinskúla.

Stóran part av árunum fram til 1959 sigldi hann við trolara og sildabátum.

Áðrenn Jóhan aftur fór til Skála, var hann eitt stutt skifti við til at byggja tann nýggja skúlan í Leirvik.

Á Skála vóru nógv framstig innan skipasmíð, Kjølbro lat byggja eina stóra høll til hetta endamál, og var Jóhan við til at byggja hesa høll.

Fyrst í 1963 flutti hann til Skála at búgva saman við familjuni.

Í tvey summar var hann smiðjuformaður í Føroyingahavnini, til hann í 1965 bleiv smiðjumeistari á Skipasmiðjuni. Hetta starv røkti hann til fulnar í samfull 25 ár. Jóhan var góður við sítt arbeiðspláss, arbeiðsfólk og ikki minst sínar lærudreingir, og munna tað verða nógvir smiðjulærlingar, ið minnast hann sum ein góðan meistara.

At Jóhan hevur haft annan áhuga enn skipasmíð sæst aftur í tí stóra arbeiði hann saman við øðrum hevur lagt í ítróttin í bygdini, og man tað fløva nú á ellisárum at síggja, hvussu gott tað gongur hjá felagnum, har hann eisini er heiðurslimur. Tað fer ikki dagur upp í millum, at hann ikki fer sína gongd niðan á vøllin, tá dystur er.

Jóhan misti sína kæru konu fyri knapt trimum árum síðan, tey vóru so fyrimyndarlig bæði, og eru tað nógv, sum hava notið gott av teirra blíðskapi og mátin tey vóru uppá yvir fyri teirra ætt og nærmastu.

Jóhan eigur í dag 4 børn, 14 abbabørn og 2 langabbabørn.

Jóhan verður ynskt hjartaliga tillukku á tí stóra degi, og má hann sum øllum ræður signa tíni ellisár. Føðingardagurin verður hildin í heiminum.

Jón Ingi Johansen, Klaksvík:

## Prógv sum bjargingarkavari



*Janus Joensen, kavarainstruktør (v.m.) og Jón Ingi Johansen, bjargingarkavari*

**Tíðindaskriv**

Leygardagin 12. august 2005 tók Jón Ingi Johansen úr Klaksvík prógv sum bjargingarkavari frá kavaraskúlanum Faroe Dive í Klaksvík. Jón Ingi hevur í eina tíð tikið bæði skrivligar og praktiskar royndir í samband við bjarging á sjónum.

### Silvurbrúdleyp

Í dag, 16. august kunnu hjúnini Berghild og Jørgen Hansen, Klaksvík, halda silvurbrúdleyp. Tey eru stødd á Bakkegade 35, 3400 Hillerød.

### 75 ár

Í dag, 16. august verður Sonja Samuelsen, Eiði, 75 ár. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Dagurin

**16. august. Rokus,** deyður umleið ár 1330. Varð føddur í Montpellier og gjørdist kendur sum tann, ið grøddi fólk, ið vóru rakt av sótt. Tá ið hann kemur til hús eftir ein pílagrímsferð til Róm, verður hann lagdur undir at njósnast, verður tikin og kastaður í fangahús, har hann doyr.